FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA

**Fundarfrágreiðing frá stýrisfundi 28. mai 2015**

---

| | |
|---|---|
| Dagur og klokkutíð: | Hósdagur 28. mai 2015 |
| Fundarstaður: | Setursskrivstovan, J.C. Svabos gøta 14 |
| Til staðar: | Herálvur Joensen, stýrisformaður, Gestur Hovgaard, Sára Joensen, stýrislimir, Sigurð í Jákupsstovu, rektari og Jørgen Meitilberg, fyrisitingarstjóri |
| | Avboð: Jan Mortensen, Tove Bull, Juanna Joensen og Vibeke Michaelsdottir |

---

Herálvur bjóðaði vælkomin.

Skráin fyri stýrisfundin varð góðkend.

Fundarfrágreiðingin frá seinasta fundi varð góðkend.

**Skrá:**

**1. Fíggjarstøðan 2015**
Fíggjarleiðarin legði fíggjarstøðuna fyri fyrsta ársfjórðing fram.

Samanumtikið kann sigast, at raksturin fyrsta ársfjórðingin hevur hildið seg innan fyri fíggjarætlanina, men tó hava inntøkurnar verði nakað minni enn upprunaliga mett.

Sambært fíggjarætlanini varð roknað við 5.444 t.kr. í útreiðslum til leysalærarar, próvdøming, starvsvenjing v.m., sum svarar til 1.361 t.kr. fyrsta ársfjórðing, men higartil í ár eru einans goldnar 857 t.kr., sum svarar til eina minni nýtslu á 504 t.kr.

Um vit hyggja eftir rakstrinum fyrsta ársfjórðing, og framskrivað raksturin restina av árinum við støði út frá fíggjarætlanini, so fáa vit eitt varisligt hall á við ársenda áljóðandi 30 t.kr.

**Fíggjarár 2015**
**Fróðskaparsetur Føroya**
**Rakstur**

| | Salda 04-2015 | Játtan 2015 | Avlop 04-2015 | Salda 05-2015 | Salda 04-2014 | Játtan 2014 | Avlop 04-2014 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 11 Lønir v.m. | 21.302.046 | 67.736.000 | 69% | 26.992.691 | 20.429.587 | 65.224.000 | 69% |
| 14 Keyp av vørum og tænastum | 3.399.200 | 8.000.000 | 58% | 3.829.529 | 3.207.053 | 8.000.000 | 60% |
| 15 Keyp av útbúnaði, netto | 237.755 | 1.100.000 | 78% | 241.497 | 375.685 | 1.100.000 | 66% |
| 16 Leiga, viðlíkahald og skattur | 1.009.121 | 2.528.000 | 60% | 1.246.713 | 907.290 | 2.528.000 | 64% |
| 21 Søla av vørum og tænastum | -73.016 | -1.500.000 | -95% | -121.541 | -68.153 | -1.500.000 | -95% |
| 32 Útvegan av løgu o.o. | 0 | 0 | 0% | 0 | 0 | 0 | 0% |
| 52 Tilskot til einstaklingar | 72.152 | 100.000 | 28% | 72.152 | 117.062 | 100.000 | -17% |
| 75 Keyps-mvg | 0 | 0 | 0% | 42.905 | 0 | 0 | 0% |
| 76 Innanh. flyt. millum almennar stovn. (innt) | -883.336 | -2.200.000 | -60% | -1.066.669 | -733.336 | -2.200.000 | -67% |
| 77 Flyting frá kommununum til landið | -288.301 | -1.500.000 | -81% | -288.301 | -331.982 | -1.500.000 | -78% |
| **Tilsamans** | **24.775.620** | **74.264.000** | **67%** | **30.948.976** | **23.903.205** | **71.752.000** | 67% |




| | Jan R | Feb R | Mars R | Apríl Framsk | Mai Framsk | Juni Framsk | Juli Framsk | August Framsk | Sept Framsk | Okt Framsk | Nov Framsk | Des Framsk |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Játtan | 6.186 | 12.371 | 18.557 | 24.742 | 30.928 | 37.113 | 43.299 | 49.484 | 55.670 | 61.855 | 68.041 | 74.226 |
| Lønir | 4.770 | 9.855 | 15.238 | 20.719 | 26.201 | 31.682 | 37.109 | 42.718 | 48.336 | 53.955 | 59.574 | 65.193 |
| Keyp av vørum og tænastum | 507 | 1.439 | 2.217 | 3.055 | 3.894 | 4.732 | 5.571 | 6.409 | 7.248 | 8.086 | 8.925 | 9.763 |
| Keyp av útbúnaði | 113 | 131 | 180 | 282 | 384 | 487 | 589 | 691 | 793 | 896 | 998 | 1.100 |
| Leiga | 264 | 504 | 756 | 994 | 1.232 | 1.471 | 1.709 | 1.947 | 2.185 | 2.424 | 2.662 | 2.900 |
| Inntøkur | 182 | -147 | -842 | -1.271 | -1.699 | -2.128 | -2.557 | -2.985 | -3.414 | -3.843 | -4.271 | -4.700 |
| Avlop/hall | 350 | 589 | 1.008 | 961 | 915 | 869 | 878 | 704 | 521 | 338 | 154 | -30 |

Við støði útfrá rakstrinum fyrsta ársfjórðing, og framskriving av rakstrinum við støði í fíggjarætlanini, sær raksturin út til at koma at halda seg innan fyri fíggjarkarmin. Hetta er tó treyta av, at vit fáa samanlagt 4.700 t.kr. í inntøkum í fíggjarárinum.

Stýrislimur ynskti, at fíggjarfrágreiðingarnar eru eitt sindur meira ítøkiligar við teksti innan økir sum fella í eyguni.

a. *Eykajáttanarumbøn*

Setrið sendi fyrst í apríl 2015 eina umbøn um eykajáttan. Tørvurin er 1.8 mío.kr., men endin varð, at Setrið fekk eina eykajáttan áljóðandi 900 t.kr. Fíggjarstøðan fyri 2015 skal gerast upp skjótast gjørligt, soleiðis at eykajáttanin kann disponerast.

## 2. Hølisviðurskifti – leigumál í Bókbindaragøtu gongur út apríl 2016

Leigumálið í Bókbindaragøtu 8 gongur út tann 30. apríl í 2016, og leigumálið verður ikki longt.

Setrið hevur í hesum sambandi sent Tórshavnar kommunu umbøn um at Fróðskaparsetrið kann leiga bygningin á Fríðrik Petersensgøtu nr. 9. í eitt nærri avtalað tíðarskeið, til dømis 3-5 ár. Fróðskaparsetrið kannar eisini aðrar møguleikar.

**3. Kunning um útbúgvingar**

*a. B.sc. í lívfrøði – Hóraldur Joensen legði fram.*

Tikið varð upp til endurskoðaðu útbúgvingina í 2014. Nýggja útbúgvingin er býtt í tríggjar partar:

- Vistfrøði
- Havlívfrøði
- Mýlsk lívvísind

*b. M.a. í søgu og samfelagsfrøði (meistaralæra)*

Útbúgvingarprofilurin er sendur MMR til góðkenningar.
Lív Paturson er byrjað á SSD, har hon m.a. samskipar fyrisitingarliga partin av uppstartinum av útbúgvingini, men tað er eitt sindur tungt, tí komið er so langt út á árið.
Útbúgvingin byrjar 17. august.
Í løtuni verður lýst verður eftir tveimum vísindaligum hjálparfólkum. Bæði størvini verða sett í 6 mánaðir frá 1. august 2015 at rokna.

*c. B.sc. í búskaparfrøði*

Útbúgvingarprofilurin verður sendur MMR til góðkenningar í næstum. Sjálvt um fíggjarliga og fakliga grundarlagið ikki enn er komið heilt uppá pláss, so verður útbúgvingin bjóðað út á heysti 2016.
Stuðulin frá TF-Holding er týdningarmikil, men útbúgvingin má raðfestast eisini á almennu játtanini, tí stuðulin frá TFH er bert ætlaður til at uppstartin.

**4. Eftirmeting av Fróðskaparsetri Føroya – uppfylging**

*a. Mál og avrikssáttmáli við Mentamálaráðið – ávegis lýsing*

Fyrisitingarstjórin kunnaði um mál og avrikssáttmálan, ið ætlandi skal gerast við Mentamálaráðið í næstum. Stýrið legði dent á, at sáttmálin, sum verður gjørdur vísandi til § 7 í kunngerð um roknskaparverk landsins, verður soleiðis háttaður, at hann eisini fevnir um menningarsáttmálan, sum skal gerast millum stýrið og landsstýrismannin, sí § 13, stk. 5 í reglugerð um virksemið hjá stýrinum. Stýrið eigur at góðkenna mál og avrikssáttmálan, áðrenn hann verður endaliga staðfestur. Stýrislimur legði dent á, at granskingarparturin skal styrkjast í avrikssáttmálanum, tí fyriliggjandi uppskot tekur ov lítla hædd fyri hesum. Somuleiðis varð spurt um tað ber til at knýta vinnuligt samstarv uppí fokusøkið "gransking"

**5. Uppfylging av málum frá stýrisfundi 9. mars 2015**

*a. Trivnaður - bøtandi átøk*

Í løtuni verða starvslýsingarnar hjá skrivarunum á NVD dagførdar.

Fundur var millum álitisfólkini hjá Starvsmannafelagnum, fíggjarleiðara og fyrisitingarstjóra mikudagin 4. februar 2015. Niðurstøðan á fundinum var, at álitisumboðini vendu sær aftur til limirnar fyri at útgreina hvørji átøk eru neyðug fyri at bøta um trivnaðin millum limirnar. Av ymiskum orsøkum m.a. tí at nakað er gjørt fyri at bøta um trivnaðin, hendi ikki meira í málinum fyrr enn álitisumboðini vórðu kallaði inn til fundar 15. mai. Niðurstøðan á hesum fundinum varð, at álitisfólkini seta seg saman við 2-3 umboðum aftrat fyri at orða tilmælið/skrivið liðugt. Fyrisitingarstjórin kallar inn til fundar um miðjan juni.

Stýrið var ásamt um, at samstarvsnevndin eigur at verða meira sjónlig, tí royndirnar vísa, at sera fáa starvsfólk biðja um at fáa mál á skrá.

*b. Politikk fyri móttøku av stuðli*
Málið varð útsett til næsta stýrisfund.

**6. Kunning og umrøða**
*a. 50 ára hald*
50 ára hátíðarhaldið má sigast at eydnast sera væl. Setrið fekk nógva umrøðu í miðlunum og fólk lótu sum heild væl av tiltakinum. Um fingurin skal setast á nakað, so var ynskiligt at fleiri fólk komu til almenna partin av hátíðarhaldinum.

*b. Søvnini á FMD*
Ein verkætlan er skipað í sambandi við arbeiðið við søvnunum á Føroyamálsdeildini. Í stýrisbólkinum eru Sigurð í Jákupsstovu, Malan Marnersdóttir, Óli Simonsen og Robert Vilhelmsen. Í arbeiðsbólkinum eru Tina K. Jakobsen, Lena Reinert, Dávur Sørensen og Robert Vilhelmsen. Gongd er komið á partar av arbeiðinum aftur. M.a. orðaseðlaskráseting og talgilding av gomlu spolabondum.

*c. Samankoyring av dátuskipanum*
Avtala gjørd við fyritøkuna 7 um at menna tøkniligt infrakervi til amankoyring av dátum úr ymsum kt-skipanum hjá Setrinum.

*d. Starvssetanir*
Kunnað varð um hesar setanir

- Heilsuvísindi
- KT
- Mýlalívfrøði
- Bókmentafrøði
- Húsavørður á NÁD

*e. Leigusáttmáli við PM Pluss*
Sáttmáli er gjørdur millum Fróðskaparsetrið og felagið PM Pluss P/F um rakstur av kantinuni á Námsvísindadeildini. Sáttmálin er galdandi frá 1. juni 2015 til 30. apríl 2017.
PM Pluss byrjar virksemið 1. juni 2015

FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA

Næsti fundur verður 17. september 2015

**Skjøl:**

i. Frágreiðing frá fíggjarleiðara
ii. Eykajáttanarumbøn
iii. Samskifti við MMR um framskriving av fíggjartørvi
iv. M.a. í samfelagsfrøði – profilur sendur MMR til góðkenningar
v. Avrikssáttmáli við MMR

*fyrisitingarstjórin*